

Nú West Hercules hevur flutt seg til Súla Stelkur leitiðmiðið við markið at bora er hetta tætt við siglingarleiðina hjá Norrønu. Hans Mortensen, maskinstjóri á Norrønu tók myndirnar sunnudagin.

# West Hercules ger klárt at bora aftur

Deil:

**Jan Müller**

01.07.2014 - 11:17

Oljan.fo

Boripallurin West Hercules kom á nýggja boristaðið á føroyska landgrunninum, Súla Stelkur leitimiðið, á miðnátt sunnukvøldið. Síðani hevur verið arbeitt við at gera klárt til at byrja nýggju boringina. Mett verður at tað fer at taka umleið tveir mánaðir at bora brunnin, sum liggur tætt við markið til Bretland.

Nógv virksemi er í løtuni í oljuhavnini í Runavík í sambandi við nýggju boringina. Umframt Sjóborg hjá Skansi Offshore hevur enn eitt supplyskip siglt við útgerð millum Runavík og pallin. Tað er Island Dawn.

Frá oljuhavnini frætta vit, at har gongur alt sum ætlað. Arbeiðið í sambandi við ta fyrru boringina á landgrunninum gekk sera væl.

Væntandi fyriliggur eitt úrslit av Súla Stelkur boringini longu í september.






